Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 18

ISSN 0907-905X

Nr. 54

26. mai 2011

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 78 frá 10. mars 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 41 frá 7. mai 2010, verða gjørdar hesar broytingar:

Aftaná § 4 verður sett:
„**§ 4 a.** Skip, sum eru 20 ár ella eldri, tá ið søkt verður um skráseting, kunnu ikki verða skrásett í Føroya Altjóða Skipaskrá.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1, kann skráseting verða loyvd, um serlig atlit tala fyri, at skipið verður skrásett.
*Stk. 3.* Uttan mun til, um eitt skip, sum søkt verður um at fáa skrásett, lýkur kravið í stk. 1 um aldur, kann skráseting verða noktað, um m.a. tekniski standurin á skipinum ella rakstrarsøgan hjá skipinum ella reiðarínum, sum eigur ella rekur skipið, talar ímóti, at skipið verður skrásett.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvussu stk. 1-3 skulu umsitast.“

**§ 2**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 145/2010

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705